

# Íslendska oljan fær kanska frið

Jan Müller

02.04.2014 - 18:20

Oljan.fo

Tað er ikki óhugsandi, at oljan undir havbotninum á Drekaleiðini í landnyrðing úr Íslandi verður verandi har.

Tað heldur í hvussu er Elín Hirst, sum er altingskvinna hjá Sjálfstæðisflokkinum, sum er annar av flokkunum í íslendsku stjórnarsamgonguni.

Hon luttók í morgun í einum orðaskifti í ríkisútvarpinum um veðurlagsbroytingarnar í sambandi við, at ST júst hevur kunngjørt eina nýggja frágreiðing um broytingarnar og avleiðingarnar av teimum.

Elín Hirst helt tað vera hugsandi, at í komandi árum fara fólk at broyta hugsan, tá tað snýr seg um orkunýtslu, og eftir sum tað fara at ganga eini 15 - 20 ár, áðrenn nøkur olja kemur av Drekaleiðini, væntaði hon, at íslendingar fáa ein spurning at taka støðu til.

-Tá vænti eg, at fólk fara at hugsa, at tað er ikki alt gull, sum glitrar, og at tað er frægast at lata oljuna verða liggjandi undir jarðarskorpuni. Eg veit sjálvandi ikki, um tað verður so, men tað fer tíðin at vísa, segði altingskvinnan.